

# Oljupallur elvir til ógvusligt stríð

**Jan Müller**

17.05.2014 - 22:35

Oljan.fo

Í Vietnam eru fólk í øðini, tí at kinesarar hava flutt ein boripall á eina havleið, sum Vietnam og Kina siga seg hava rætt til. Øðin er so stór, at minst 20 kinesarar hava latið lív í ófriði í Vietnam, og fleiri hundrað kinesarar eru rýmdir av landinunm.

Ófriðurin kyknaði mánadagin og hevur staðið við síðani. Fyrradagin settu mótmælisfólk eld á eina kinesiska verksmiðju í býnum Binh Duong, og í Ha Tinh vóru ógvuslig mótmæli uttan fyri eitt stálverk, sum ein fyritøka í Taiwan eigur.

Tíðindastovurnar skriva, at fleiri kinesiskar, taiwanskar og suðurkoreanskar fyritøkur hava latið sínar skrivstovur í Vietnam aftur orsakað av teimum ógvusligu mótmælistiltøkunum.

Kina og Vietnam kanna sær eina havleið í Suðurkinesiska Havinum, har tað er rættiliga sannlíkt, at nóg olja er í undirgrundini. Fyri nøkrum døgum síðani kom kinesiski

boripallurin Haiyang Shi You 981 á ta umstríddu leiðina. Vietnam mótmælti alt fyri eitt, men kinesiska leiðslan hevur svarað, at um neyðugt fer kinesiski herflotin at verja pallin.

Ein talsmaður fyri uttanríkisráðið í Filipsoyggjunum segði í gjár, at Kina hevur ætlanir um at byggja ein flogvøll á einum rivi, sum er á teirri umstríddu havleiðini.